

## Skógfriðingarnevnd og metingarnevnd mannaðar

Landsstýriskvinnan í innlendismálum, Annika Olsen, hevur valt limir í ávikavist skógfriðingarnevndina og metingarnevndina. Í skógfriðingarnevndina eru hesi vald: Sigga Rasmussen, cand.hort., Jóhan Mortensen, tíðindamaður, Dánjal Petur Højgaard, lívfrøðingur, Turid Madsen, jarðfrøðingur og Erika Lómstein Petersen, skrivstovukvinna. Skrivari hjá nevndini er Tróndur Leivsson, landsskógarvørður. Í metingarnevndina, sum viðger spurningar um endurgjald í samband við ognartøku og annað, eru hesi vald: Ari Johannesen, cand.merc. formaður, Marja Lamhauge, íløguráðgevi. Tiltakslimir eru Petur á Lava Olsen, byggifrøðingur og Súsanna í Búðini, bóndi. Sum serkønar hjálparar hjá metingarnevndini hevur landsstýriskvinnan tikið avgerð um at tilnevna Armgarð Steinhólm, Verkfrøðingafelagið, Suna Dalsgaard, arkitekt, Landsverk, Niels V. Petersen, umsjónarmaður, Felagið peningastovnar og Henrik Johansson, landmálari, Tórshavn. Nevndirnar eru valdar fyri 6 ár.

*Lagt til rættis: Rógvi Nybo, rogvi@sosialurin.fo*

# FM 08 í Reinsarínum

Fyrsta innleiðandi umfarið av nýggju tónleikakappingini FM'08 verður leygardagin 22. november í Reinsarínum. Sjey bólkar koma at kappast um finaluplássini, og má sigast at hetta verður ein verulig høvuðsstaðaruppgerð. Luttakandi bólkarnir eru allir úr somu kommunu, og eru teir úr Kollafirði, Tórshavn og av Argjum. Á hesi síðu prenta vit nakrar upplýsingar um bólkarnar.

### Oniontree

**Staður:**
Argir/Tórshavn

**Um bólkin:**
- Oniontree er ein tónleikabólkur úr Havn, sum var stóvnaður summari 2008. Dreingirnir, sum manna bólkin eru Sigmund Jørgensen, Jan Mýrá og Magnus Mortensen. Í septembur 2008, aftaná teir høvdu brúkt tíð uppá, at gera tilfar og funnu útav, at hettar fór at blíva feitt, fóru teir í studio hjá Kristoffur Mørkøre. Har upptóku teir løgini 'A good day for dying' og 'Memories'. - Tann 18. Oktobur opnaðu Oniontree eina útselda konsert í 'Lille Vega' fyri The Dreams. Hettar var fyrsta stóra konsertin hjá Oniontree. Tað gekk ómetalig væl, og har komu nógvir Oniontree fans burturúr. Konsertin gav teimum vón um, at við hesum bólkinum kundi henda nógv stór ting. Og nú er málið at vinna hjørtini hjá øllum Føroyingum.

**Manning:**
Sigmund Jørgensen: Gittar og sang
Jan Mýrá: Bass
Magnus Mortensen: Trummur

**Genre:**
Rock/Punk/Alternative

**Heimasíða:**
*www.myspace.com/oniontree*

### Trygvi og Rasmus

**Staður:**
Tórshavn

**Um bólkin:**
Trygvi og Rasmus eru tveir dreingir, ið spæla í bólkinum Sixtyeight. Og í summarfrítíðini, byrjaðu teir at trena akustiskt, og fingu somikið burturúr, at teir spæla konsertir. Nú hava vit so fingið eina gentu við okkum, ið eitur Jenný Kragesteen.

**Manning:**
Trygvi Danielsen: guitar og sang
Rasmus Borðoy: guitar, klaver og sang
Jenný Kragesteen: sang

**Genre:**
Akustiskt/flipput/jam

**Heimasíða:**
*www.myspace.com/trysmus*

### Bandana Boys

**Staður:**
Tórshavn

**Um bólkin:**
Hugskotið til Bandana Boys kom, tá id Bjartur og John plagdu at taka nakrir langir renningatúrar í summarinum 2007. Teir høvdu bandana'ir á fyri hárið, og aftaná langa tíd kom eitt gott stev í, og ymiskar góðar tekno-rútmur byrjaðu at uppstanda í høvdinum. So, útbláStir og sveittutir bestemmaðu teir seg at gera ein elektroniskan bólk.

**Manning:**
Bjartur Fríði Clementsen: Synth, programmering og rytmubox
John Áki Egholm: keyboard og programmering
Harald í Kálvalíð Jacobsen: programmering og mixing.

**Genre:**
Electronica

### Moby The Pink Pilot

**Staður:**
Argir

**Um bólkin:**
Eitt projekt hjá Fróða og Bartal, ið eisini plagar at rúma øðrum gestatónleikarum

**Manning:**
Fróði Hansen:sang og trummur
Bartal Augustinusse: gittarar
Petur Háberg:Bass
Mattias Kapnas: keyboard

**Genre:**
Rock

**Heimasíða:**
*www.myspace.com/mobythepinkpilot*

### Lost in France

**Staður:**
Tórshavn

**Manning:**
Halltórur Dam: sang og guitar
Andreas Weihe Madsen:guitar og sang.

**Heimasíða:**
*www.myspace.com/lostinfrance1*

### The Hunters

**Staður:**
Tórshavn

**Um bólkin:**
Bólkurin hevur spælt saman í eitt hálvt ár

**Manning:**
Bogi: Lead Guitar
Bjartur: Trummir
Jordi: Guitar og sang

**Genre:**
Punk/Rock

**Heimasíða:**
*www.Hunters.Whipie.com*



### 3st *(úttalast Thirst)*

**Staður:**
Kollafjørður/Tórshavn

**Um bólkin:**
Sangarin og trummusláarin stovnaðu bólkin í 2004. Men hann hevur ongantíð funnið stevið, og hevur skift manning út ofta. 3st hava ikki spælt so øgiliga nógvar konsertir, men nú er manningin stabil, og nú er bólkurin klárur at spæla fleiri konsertir.

**Manning:**
Henning Jensen: guitar
Signar Kristiansen: bass
Rebekka Blak: violin
Allan Korsager Davidsen: sang
Sigurd Justinussen: trummur

**Genre:**
Harður melodiskur poprock

**Heimasíða:**
*www.myspace.com/3stfan*